# Havsøki órógvar innsiglingina til Esbjerg

*Vrakið av Havsøka er ein hóttan ímóti trygdini hjá skipum og bátum á Esbjerg-leiðini og kann eisini elva til eina umhvørvisvanlukku*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Vrakið av einum føroyskum skipið eru nú við at elva til rumbul í Danmark.

Tað var tann 27. November í fjør, at Havsøki brádliga sakk beint uttanfyri havnina í Esbjerg.

Men har liggur hann enn, og tað hevur elvt til misnøgd í Esbjerg, tí teir stúra fyri, at hann skjótt fer at vera til almikið fortreð hjá bátum og skipum, sum sigla har á leiðini, umframt at vandi er fyri eini umhvørvisvanlukku.

Danir eru rættiliga harmir um, at vrakið av Havsøka ikki er bjargað enn. Og teir illneitast inn á, at danir hava ráð til at hava ein flúgvara standandi til reiðar allan sólarkringin hjá danska krúnprinsinum, sum er í Grønlandi.Men samstundis vísir tað seg at vera ómøguligt at útvega pening til at bjarga Havsøka, so at skip og bátar kunnu sleppa undan vandanum, og so at sleppast kann undan eini hóttandi umhvørvisvanlukku.

Eitt nú skrivar Jydske Vestkystan nú um dagarnar, at vandi er fyri, at trol og onnur útgerð fara at slíta seg leys av vrakinum og fara at vera til vanda fyri skip og bátar, sum sigla á Esbjergleiðini, ikki minst hjá teimum, sum skulu inn og út úr havnini.

Blaðið skrivar, at danskir myndugleikar hava sent almenna ávaring til skip og bátar um vandan

Men danir eru eisini bangnir fyri, at olja fer at leka úr Havsøka og elva til eina umhvørvisvanlukku.



*Tað er so grunt, har klaksvíksskipið, Havsøki, sakk, at mastrarnar stinga uppundan. Nú eru danir farnir at illneitast inn á vrakið og hava ávarað skip og bátar um vandan, sum kann standast av tí*

### Ikki uppklárað

Annars veit ongin, hví ídnaðarbáturin Havsøki úr Kkaksvík brádliga sakk hendan novemberdagin beint uttanfyri innsiglingina í Esbjerg.

Hann tók brádliga at leka og sakk á Grådyb Barre, ein kilometur frá innsiglingsrennuni til Havnina.

Har liggur hann nú á ikki meiri enn sjey metra dýpi so at mastrarnar stinga upp undan.



*Umframt vandan fyri oljuleka, óttast menn aðrar vraklutir, sum koma frá Havsøka*

### Hava selt vrakið

Spurningurin er bara, hvør hevur ábyrgdina av Havsøka, har hann nú liggur sokkin beint uttanfyri størsta fiskivinnubý í Danmark.

Hjá deildarstjóranum á Sjóvartrygginini, Páll Kunoy, er als ongin ivi.

– Felagið, sum átti Havsøka hevur fingið tryggingarupphæddina og Sjóvartryggingin yvirtók so vrakið.

– Men síðani er vrakið selt einum donskum upphøggingarfelagið í Esbjerg, sum er væl kunnugt við skipaupphøgging

Hesin handilin fór sjálvandi fram ígjøgnum lógfrøðingar so hon er í lagi.

Men hetta ber somuleiðis í sær, at samstundis sum danska upphøggingarfelagið keypti vrakið, yvirtók tað eisini alla ábyrgd av vrakinum og samstundis eisini allar skyldur og øll rættindi.

– Sostatt er talan um ein danskan trupulleika burturav, tí tá ið vrakið varð selt, bleiv føroyska Sjóvartryggingin samstundis fullkomiliga leys av tí og hevur onki við tað at gera longur, sigur Páll Kunoy.

Hann vil ikki siga, hvussu nógv upphøggarin keypti vrakið fyri.

Vit fingu ikki fatur á danska upphøggaranum, men tað er ikki vanligt at bjarga slíkum vrakum um veturin, tí oftast verður bíðað til um sumrarnar til veðrið batnar aftur og hetta kann vera orsøkin til, at vrakið ikki er bjargað enn.

Havsøki varð smíðaður í Harstad í 1958 og hann hevur fyrr itið Vestnot, inntil hann í fjør varð keyptur til Klaksvíkar og fekk navnið Havsøki.

# Eiga at brúka Caragataálitið við varsemi

*Fara politikararnir undir orðaskiftinum um vinnulívspolitikkin at viðgera seinasta partin av Caragata-álitinum um búskaparvøkstur og skattatrýst, so er vandi fyri, at orðaskiftið kemur út á eitt síðuspor sigur búskaparsfrøðingurin Jóannes Jacobsen*

JAN MÜLLER

Í dag fer løgtingið undir aðalorðaskifti um vinnulívspolitikk, eitt mál, sum uttan iva fer at fáa drúgva umrøðu á tingi. Sum partur av hesum orðaskifti fer uttan iva at vera Caragata-frágreiðingin, sum Vinnumálastýrið bílegði nakað herfyri og sum varð almannakunngjørd í fjør.

Sosialurin hevur spurt skrivaran í Búskaparráðnum, Jóannes Jacobsen um eina viðmerking til, at Caragataálitið helst verður ein partur av grundarlagnum undir orðaskiftinum um vinnulívspolitikkin frameftir.

Jóannes Jacobsen viðgjørdi annars júst hetta álitið á einum fundi í Framburðsfelagnum í Havn, te. valfelag Fólkafloksins. Har var hann rættiliga bersøgin og fýrdi ikki fyri at koma við kritikki eisini.

Uppá fyrispurning um Caragataálitið er eitt gott fundament undir einum orðaskifti um vinnulívspolitikkin sigur Jóannes Jacobsen, og hann fyrst leggur dent á, at tað er sum búskaparfrøðingur og ikki sum skrivari í Búskaparráðnum, at hann úttalar seg.

Hann heldur, at partur av álitinum er væl nýtiligur í so máta, men hann ávarar ímóti at taka seinasta partin av frágreiðingini frá Caragata uppí orðaskiftið um vinnulívspolitikkin.

Tann seinasti parturin av álitinum snýr seg um sambandið millum búskaparvøkstur og skattatrýst. -Tann parturin av frágreiðingini kann ikki brúkast í slíkum orðaskifti, hvørki teoretiskt ella statistiskt. Eftir míni metan er tað arbeiðið ikki nóg væl gjørt.

Talan er um tann seinasta triðingin av Caragata-álitinum. Jóannes Jacobsen sigur, at tann fyrsti parturin av álitinum, sum snýr seg um privatiseringar, er gott grundarlag undir einum orðaskifti um vinnulívspolitikk, hóast hann ikki er so djúpur. -Tað skal nógv meira útgreiningararbeiðið gerast aftrat, áðrenn man kann taka støðu í ymsum privatiseringsmálum.

Jóannes Jacobsen heldur eisini, at vit mugu ansa eftir ikki at blanda ting saman, tá vit tjakast um vinnulívspolitikkin. -Tá man tosar at privatisera Føroya Banka, Føroya Tele osfr. má ein ikki blanda skattatrýst ol. uppí. Tá verður tað eitt orðaskifti um ideologi. Eftir mínum tykki eiga vit heilt at kobla frá tjakið um búskaparvøkstur og skattatrýst og heldur umrøða sjálvan vinnulívspolitikkin.

Uppá fyrispurning um hann metir Caragata-álitið sum eitt slag av ideo-logiskum manifesti fyri einum føroyskum høgrapolitikki svarar Jóannes Jacobsen bæði ja og nei. -Tað haldi eg ikki man kann siga um tann fyrsta partin, men í seinasta partinum um búskaparvøkstur og skattatrýst haldi eg man kann síggja eina høgraideologi.



### Búskaparráð-leysir

Búskaparráðið hevur annars ongantíð viðgjørt Caragataálitið sum so. Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa eina viðmerking frá formanninum í Ráðnum, Bjarna Olsen.

Ráðið fór annars frá 1. januar. Nevndin varð vald fyri trý ár og gekk tíðin út á nýggjárinum. Síðani tá er eingin nýggj nevnd vald. Tað er Fróðskaparsetrið, sum stillar inn umboð til Búskaparráðið, sum Fíggjarmálastýrið síðani setir.



# Javnaðarflokkurin vil veruligt sjálvstýri

*Jóannes Eidesgaard vísir á, at munurin ímillum samgonguna og Javnaðarflokkin er, at samgongan vil formelt sjálvstýri beinan vegin, meðan Javnaðarflokkurin ynskir at arbeiða stigvíst móti veruligum sjálvstýri*

JOHN JOHANNESSEN

– Vit ynskja heilt greitt ein nýggjan ríkisrættarligan sáttmála millum Føroyar og Danmark. Men høvuðsmunurin á sáttmálanum, vit ynskja og sáttmálanum, samgongan ynskir, er, at samgongan vil hava ein sáttmála, ið staðfestir formelt føroyskt sjálvstýri, meðan vit ynskja ein sáttmála, ið gevur Føroyum veruligt sjálvstýri.

Formaður Javnaðarfloksins sigur, at Javnaðarflokkurin nú hevur tikið endaliga støðu í spurninginum um ríkisrættarligu støðu Føroya, og tískil fer flokkurin ikki at nýta meira tíð og orku uppá at viðgera fullveldisuppskotið hjá samgonguni.

### Veruligt sjálvstýri

Jóannes Eidesgaard vísir á, at tá Javnaðarflokkurin tosar um veruligt sjálvstýri, merkir hetta, at vit skulu gera ein sáttmála við donsku stjórnina, ið sigur, at Føroya Løgting ger av, hvørji málsøki verða tikin yvir, so hvørt vit hava fíggjarliga- og umsitingarliga orku til tess.

– Tað, sum landsstýrið vil við fullveldisætlan síni, er at fáa staðfest føroyskt fullveldi ein ávísan dag. Landsstýrið vil taka yvir øll mál í senn og síðani lata fleiri teirra aftur til danir at umsita. Hetta er jú púra øvugt mannagongd.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at ætlan landsstýrisins merkir, at vit skulu gera ein rúgvu av sáttmálum við danir um, hvussu teir skulu umsita øll tey málini, vit ikki megna at umsita, tá vit hava tikið fullveldi eftir ætlan landsstýrisins.

– Hetta merkir, at ábyrgdin skal liggja í Føroyum, men umsitingin í Danmark.

Hetta, heldur Jóannes Eidesgaard, fer at gera, at vit fáa ein øgiligan umsitingarligan vavstur, ið verður nógv ógreiðari enn verandi ríkisrættarliga støða.

Men verður ætlan Javnaðarfloksins um at taka yvir málsøkini so hvørt vit ynskja tað, heldur Jóannes Eidesgaard, at tá verður talan um veruligt sjálvstýri í yvirtiknu málunum.

– Okkara ætlan er ein ætlan, ið er møgulig at fremja í verki, uttan at hon minkar um livistøðið hjá Føroya fólki.

### Mugu virða komandi landsstýri

Jóannes Eidesgaard sigur seg ikki skilja, at landsstýrið gongur so høgt uppí, at vit skulu fáa ein sáttmála, sum sigur, at vit fáa fullveldi ein ávísan dag.

– Okkara uppskot fylgir uttan iva betur fólkaræðisligum grundreglum, tí vit ynskja ikki at binda nakað komandi landsstýri, men at arbeiða okkum so líðandi móti størri og størri sjálvræði, sigur Jóannes Eidesgaard.

Formaður Javnaðarfloksins heldur tað vera skilabest at gera ein sáttmála við danir, ið kann sigast upp av báðum pørtum. Hann vísir á, at við slíkum sáttmála er møguleiki fyri at siga sáttmálan upp, fyri at gera ein nýggjan enn betri sáttmála, allatíðina til staðar.

### Loysingin ikki mál í sær sjálvum

Hóast Jóannes Eidesgaard púra greitt vísir á, at Javnaðarflokkurin ynskir víðkað sjálvstýri, staðfestir hann kortini, at loysingin fyri Javnaðarflokkin ikki er eitt mál í sær sjálvum.

– Høvuðsmálið hjá Javnaðarflokkinum er at skapa virðingarbestu liviumstøður fyri allar føroyingar, og hetta verður á bestan hátt gjørt við sjálvstýrisuppskoti okkara. Men tað skal vera í neyvum samstarvi við danir, tí samstarv er eitt lykla-orð í sosialdemokratiskum politikki, staðfestir Jóannes Eidesgaard.

Jóannes Eidesgaard sigur, at tvær meginreglur liggja sum grund fyri støðutakan floksins. Tann fyrra er, at ætlan landsstýrisins eftir øllum at døma fer at merkja eitt afturstig í livikorum og vælferð hjá fólkinum. Hin er, at uppskot samgongunnar ikki fer at geva eitt greitt valds- og ábygadarbýti.

Formaður Javnaðarfloksins er fegin um, at Javnaðarflokkurin á eykalandsfundinum leygardagin enn einaferð hevur staðfest, at flokkurin innanhýsis er samdur í spurninginum um ríkisrættarligu viðurskiftini.

– Vit hava nú tikið endaliga avgerð, og fara vit tískil ikki at brúka fleiri kreftir til at viðgera uppskot samgongunnar. Hon kann nú sigla sín egna sjógv, sigur Jóannes Eidesgaard, sum kortini virðir samráðingarrættin hjá landsstýrinum í ríkisrættarliga spurninginum.



*Jóannes Eidesgaard ger púra greitt, at nú verða ikki fleiri kreftir brúktar at viðgera fullveldisuppskot samgongunnar*

# Javnaðarflokkurin gjørt støðuna upp

*Javnaðarflokkurin staðfesti á eykalandsfundi leygardagin, at hann ikki fer at taka undir við ælan samgongunnar um at loysa Føroyar úr ríkisfelagsskapinum*

JOHN JOHANNESSEN

Javnaðarflokkurin vil hava størri Føroyskt sjálvræði, men hann tekur ikki undir við ætlanini hjá samgonguni um at Føroyar verða loystar úr ríkisfelagsskapinum.

Hetta má metast at vera høvuðsniðurstøðan í fundarsamtyktini frá eykalandsfundi floksins í Læraraskúlahøllini leygardagin.

### Ynskja nýggjan sáttmála

Hóast Javnaðarflokkurin ikki tekur undir við fullveldisætlan landsstýrisins, ásannar hann kortini, at verandi ríkisrættarliga støðan er ógreið, og at hon ikki nóg væl tryggjar føroyskt sjálvstýri og sjálvsavgerðarrætt.

Tí vísir Javnaðarflokkurin á eina nýggja skipan, ið skal grundast í einum altjóðarættarligum sáttmála millum Føroyar og Danmark.

Í hesum sáttmála skal staðfestast, at ríkisfelagsskapurin er grundaður á sáttmála millum tvær sjálvstøðugar tjóðir, og at hann er galdandi, til annar parturin sigur hann upp.

Staðfestast skal eisini, at tað er Føroya Løgting, sum umboð fyri Føroya fólk, sum er evsta vald á øllum málsøkjum, sum eru yvirtikin.

Hvørji mál, sum skulu kunna yvirtakast og sostætt koma undir fult føroyskt ræði, skal einki mark vera fyri.

Javnaðarflokkurin staðfestir, at besta boðið upp á broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum framvegis er uppskot floksins um eina sjálvstýrislóg. Hetta uppskotið legði Javnaðarflokkurin fram fyri einum ári síðani.



*Mongu uppskotini til fundarsamtyktvóru væl og virðiliga viðgjørd av fundarfólkinum*

**Mynd: Jan Müller**

### Samgongan vil ikki vikað seg

Sambært fundarsamtyktini frá eykalandsfundinum hevur Javnaðarflokkurin síðani løgtingsvalið arbeitt fyri at finna eina breiða semju í sjálvstýrismálinum. Men nú sigur hann seg noyðast at staðfesta, at samgongan ikki vil vika seg, og tí kann landsfundurin ikki geva tilsøgn um stuðul í fullveldisætlanini.

Javnaðarflokkurin vísir á, at alt bendir á, at einvísa mál samgongunnar verður ein hóttan móti livikorum um vælferð hjá Føroya fólki, samstundis sum uppskot samgongunnar als ikki loysir ógreiða valds- og ábyrgdarbýtið millum Føroyar og Danmark.

– Javnaðarflokkurin hevur nú í gott 70 ár virkað fyri, at vit í Føroyum skapa eitt samhaldsfast samfelag fyri frí og fræls menniskju, har umsorganin fyri felags áhugamálum og vælferð er í hásæti. Hesin arbeiðssetningur ger av, hvussu øll onnur mál verða loyst, eisini ríkisrættarligi spurningurin, ger Javnaðarflokkurin í fundarsamtyktini greitt.



*Formaðurin royndi at taka ímóti góðum ráðum frá fundarfólki áðrenn endaligu niðurstøðuna*

**Mynd: Jan Müller**